
MYND: Helgi Jacobsen

Universitetini í Norðurlondum skulu samstarva í masterútbúgvingum. Herfyri vóru Karolina Videll og Kristin Kalvik, lestrarvegleiðarar á Universitetinum í Bergen í Føroyum og tosaðu við fólk á Fróðskaparsetrinum.

# Setrið millum vinnarar í nýggjari masterútbúgving

Av 41 umsóknum gjørdist Fróðskaparsetrið millum vinnararnar av seks nýggjum masterútbúgvingum, sum Norðurlandaráðið hevur tikið stig til. Fróðskaparsetrið skal saman við trimum universitetum standa fyri eini masterútbúgving í havvistfrøði. Talan er um eina heilt nýggja og tvørfakliga útbúgving. Tilsamans 41 samtøk lótu umsókn inn til Norðurlandaráðið, og tá avtornaði, sluppu seks gjøgnum nálareygað. Fróðskaparsetrið skal samstarva við universitetini í Bergen, Århus og Reykjavík. Tey hava fingið eina millión krónur at fyrireika og marknaðarføra útbúgvingina, so hon kann byrja komandi lestrarár.

Master í havvistfrøði verður heitið á fyrstu føroysku tvørfakligu útbúgvingini á masterstigi. Fróðskaparsetur Føroya hevur við gløggum og framskygdum samstarvi lagt lunnar undir nýggju tvørfakligu masterútbúgvingi í Marine Ecosystems. Hetta verður gjørt í samstarvi við universitetini í Bergen, Århus og Reykjavík.

Universitetið í Bergen fer at standa fyri tí mesta av undirvísingini, meðan Fróðskaparsetur Føroya skal taka sær av undirvísingini í fiskivinnuhavfrøði. Starvsfólk á Fiskirannsóknarstovuni og Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsterinum standa fyri føroyska undirvísingarpartinum.

Upprunaliga er Norðurlandaráðið stigtakari til nýggju útbúgvingina. Norðurlandaráðið heitti á øll universitetini í Norðurlond-um um at vera við í einum tiltaki til tess at stovna nakrar nýggjar norðurlendskar masterútbúgvingar. Lagt var upp til, at talan eins væl kundi vera um tvørfakligan lesna.

### STÓRUR ÁHUGI

Ætlanin var frá byrjan, at trý av bestu hugskotunum skuldu fáa stuðul at menna síni hugskot og gera tey til veruleika. Men av tí at áhugin var ovurhonds stórur, avgjørdi Norðurlandaráðið at seta pengar av til seks nýggjar masterútbúgvingar.

Umframt havvistfrøðiligu útbúgvingina, fara universitetini í Lund og Háskóli Íslands undir eina masterútbúgving í Gerontology meðan Åbo, KTH í Stockholm og Danmarks Tekniske Universitet fara undir útbúgving í Innovitari information og kommunikatión.

Umframt universitetið í Keypmannahavn fara Norwegian University of Life Sciences, Swedish University of Agriculture Sciences og Universitetið í Helsinki undir eina útbúgving í Plant Pathology. Í Stockholm verður ein heilt nýggj útbúgving í Engineering, har málið er burðardygg orkuframleiðsla. Samstarvsfelagaðarnir her eru Universitetini í Helsinki, Chalmers Tekniska Høgskola, Noregs tekniska- og náttúruvísindaliga Universitet og Universitetið í Reykjavík.

Og sætta nýggja masterútbúgvingin verður í Århus. Hon hevur heitið The Religious Roots of Europe. Umframt Århus eru universitetini í Helsinki, Lund, Keypmannahavn, Oslo og Bergen saman um hesa humanistisku útbúgvingina.

### FØROYAR TÓKU STIG

Í alheimsgerðini er endamálið við útbúgvingunum at fáa lærdu stovnarnar at samstarva um nýggjar tvørfakligar útbúgvingar tvørtur um landamørk. Tá rektarin á Fróðskaparsetrinum, Hans Pauli Joensen, sá tilboðini frá Norðurlandaráðnum, sendi hann bóltin víðari til Boga Hansen á Fiskirannsóknarstovuni.

Bogi Hansen sigur, at hann síðani vendi sær til fólk í Norðurlondum innan havfrøði og havbiologi. Tað vísti seg, at stórur áhugi var allastaðni, ikki minst í Bergen, har avgjørt er, at kjarnin í hesi útbúgvingini skal vera.

- Eg vóni at hetta fer at menna okkum á útbúgvingarøkinum. Útbúgvingin er eisini kærkomin nú Setrið er í ferð við at endurskoða sínar útbúgvingar við eini nýggjari seturslóg, sigur Bogi Hansen.

### MENNA HEILDARGRANSKING

- Treytin fyri at fáa nýggju masterútbúgvingarnar góðkendar var, at talan er um samstarv millum fleiri lærustovnar í Norðurlondum. Høvuðsmálið er, at ymisku granskingarførleikarnir í teimum fimm norðurlondunum skulu styrkja heildargranskingina, siga Kristin Kalvik og Karolina Videll, lestrarvegleiðarar á Universitetinum í Bergen.

Í sambandi við masterútbúgvingina í havvistfrøði vísa tær báðar á, at hvørt av teimum fýra universitetunum, sum eru saman um útbúgvingina, eru sterk á sínum serstaka øki. Ætlanin er so, at eginleikarnir hjá hvørjum einstøkum stovni smitta av á hinar stovnarnar og at øll londini á tann hátt fáa eina menning, bæði fakliga og á granskingarstigi.

- Talan er um eina heilt nýggja og tvørfakliga útbúgving, har tað biologiska og tað vistfrøðiliga verða tvinnað saman, siga lestrarvegleiðararnir Kristin og Karolina.


Bogi Hansen, havfrøðingur, hevur í samstarvi við trý onnur universitet í Norðurlondum gjørt Fróðskaparsetrið til samstarvspartnara í masterútbúgving í havvistfrøði.

Útbúgvingin er tvey semestur ella tvey ár. Fyrsta árið verða tey lesandi fyri tað mesta í Bergen, men tað seinna árið skulu tey lesandi skriva master-ritgerðina og eru ikki so bundin at nøkrum einstøkum stovni allatíðina. Lagt er upp til, at Fróðskaparsetrið fer at hýsa síðstaárslesandi, meðan tey skriva master-ritgerð.

### BYRJAR KOMANDI ÁR

Norðurlandaráðið hevur latið eina mió. kr. til at menna hvørja av hesum nýggju útbúgvingunum. Havvistfrøðilesturin byrjar komandi ár. Nú skal lestartíðin leggjast tilrættis, samstarvið skipast og útbúgvingin marknaðarførast.

Ein masterútbúgving kemur vanliga oman á eina bachelor-útbúgving og svarar á fleiri universitetum til endaligu høvuðsritgerðina í eini universitetsútbúgving.